# Tungt at skriva lættan tekst

**Tað er ikki so lætt at skriva lættan tekst. Tí skipa Skúlabókagrunnurin og Bókadeildin fyri skeiði í at skriva lættlesiligan tekst til børn**

UNDIRVÍSING
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*




Í apríl skipa Føroya Skúlabókagrunnur og Bókadeild Føroya Lærarafelags fyri skeiði í at skriva lættlesiligan tekst til børn.

Forløgini greiða frá, at hetta við at skriva lættlisnan tekst er eitt serligt handverk, ikki minst í sambandi við fyrstu lesingina.

Á skeiðinum fara lesifrøðingar at greiða frá, hvat lættlesiligur tekstur er, og hvat høvundurin skal hugsa um, tá hann skrivar lættlisnan tekst. Eisini fer Lydia Didriksen, lærari, skúlabókavørður og rithøvundur, at greiða frá tilgongdini frá handriti til lidna bók.

Hetta eru somu forløg, sum geva út sonevndu krabbabøkurnar, ið eru lættlisnar bøkur til børn og ung. Síðani 2008 eru 45 krabbabøkur komnar út í sjey torleikastigum, og í 2010 koma 28 krabbabøkur út.

Forløgini siga, at hetta eru góðar bøkur um evni, ið børn og ung hava áhuga fyri; mestsum allir fólkaskúlarnir hava teknað seg sum haldara av bókunum, og afturmeldingarnar hava verið serstakliga góðar.

Meginparturin av bókunum eru týddar, men í heyst komu tær fyrstu upprunaføroysku krabbabøkurnar út. Hetta vóru fýra bøkur til fyrsta torleikastig. Lydia Didriksen hevur skrivað, og tvey ung listafólk hava myndprýtt. Í heyst koma tær næstu fýra upprunabøkurnar út.

Forløgini greiða frá, at tey miða eftir at geva nakrar upprunaføroyskar krabbabøkur út á hvørjum ári.

Skeiðið verður í Norðurstovu í Norðurlandahúsinum 14. apríl klokkan 13-16. Freistin at tekna seg er 26. mars, og luttøkan er avmarkað. Skeiðið er ókeypis, og áhugað kunnu venda sær til forløgini.

Krabbabøkurnar eru lættlisnar bøkur, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunnur geva út í felag.

Tær eru ætlaðar at fáa glið á lesingina hjá næmingum, ið nýliga hava lært at lesa, og bøkur, ið eru lættar at lesa hjá næmingum, ið ikki hava so lætt við at lesa.

Krabbabøkurnar eru skrivaðar á einfaldan hátt við stuttum orðum og stuttum setningum.

**Endamálið við krabbabókunum er:**
- at stimbra lesingina hjá barninum, sum er í ferð við at læra at lesa
- at stimbra lesingina hjá barninum, sum nýliga hevur lært at lesa
- at stimbra lesingina hjá barninum, sum hevur ilt við at lesa
- at kveikja lesihugin hjá barninum, sum ikki tímir so væl at lesa

